**Úrskurður Ítróttadómstólsins**

viðvíkjandi kæru frá Havnar Svimjifelag

um úrskurðin hjá Dómsnevndini hjá Svimjisambandi Føroya

Ítróttadómstólurin hevur viðgjørt kæru frá Havnar Svimjifelag (HS), dagfest 3. apríl 2023, um úrskurðin hjá Dómsnevndini hjá Svimjisambandi Føroya (SSF), dagfestur 28. mars 2023, um at útihýsa høvuðsvenjaran hjá Havnar Svimjifelag, Maciej Hampel, frá uppgávum fyri Svimjisamband Føroya uttanlands til og við 17. august 2023.

Havnar Svimjifelag heitir á Ítróttadómstólin um at seta revsingina niður.

Í viðgerðini í Ítróttadómstólinum hava 4 nevndarlimir luttikið: Jóhan Lamhauge, Magnus Dam, Sissal Kristiansen og Heðin Joensen, nevndarlimir.

Semja er millum limirnir í Ítróttadómstólinum um, at forkvinnan er ógegnig til at viðgera kæruna.

Kæran er innkomin rættstundis til Ítróttadómstólin.

Grundarlagið undir viðgerðini av kæruni:

- Niðurstøða starvsnevnd SSF's, dagfest 26. august 2022
- Áheitan frá Havnar Svimjifelag á Starvsnevnd SSF's at taka málið upp til nýggja viðgerð, dagfest 3. september 2022
- Svar frá Starvsnevnd SSF's til Havnar Svimjifelag um áheitan um uppafturtøku, dagfest 16. september 2022
- Kæra frá Havnar Svimjifelag til Dómsnevnd SSF's, dagfest 22. september 2022
- Avgerð hjá Dómsnevnd SSF's um heimvísing av málinum, dagfest 4. oktober 2022
- Móttøkuváttan Havnar Svimjifelags av avgerð Dómsnevnd SSF's um heimvísing, dagfest 7. oktober 2022
- Fyrispurningur um málsgongdina frá Havnar Svimjifelag til Dómsnevnd og starvsnevnd SSF's, dagfest 24. oktober 2022
- Samskifti millum Havnar Svimjifelag og Starvsnevnd SSF's um kærumálsviðgerð, dagfest 14. og 16. november 2022
- Samskifti millum Havnar Svimjifelag og Starvsnevnd SSF's um kærumálsviðgerð, dagfest 15. november 2022
- Hoyringsskriv frá Leks advokatfirma til Havnar Svimjifelag, dagfest 7. desember 2022
- Hoyringssvar frá Havnar Svimjifelag til SSF og Leks Advokatfirma, dagfest 28. desember 2022
- Ætlanarskriv frá Starvsnevnd SSF's, dagfest 27. januar 2023
- Fyrispurningur frá Havnar Svimjifelag til Leks Advokatfirma, dagfest 28. januar 2023
- Svar frá Havnar Svimjifelag til ætlanarskriv frá SSF og Leks Advokatfirma, dagfest 10. februar 2023
- Avgerð Starvsnevnd SSF's, dagfest 27. januar 2023
- Fylgiskjal, teldupostsamskifti, dagfest 17. august 2022
- Kæra Havnar Svimjifelags til Dómsnevnd SSF's, dagfest 7. mars 2023
- Samskifti millum Havnar Svimjifelag og Dómsnevnd SSF's, dagfest 21. mars 2023

- Teldupostur um avgerð Dómsnevnd SSF's, dagfest 28. mars 2023
- Avgerð Dómsnevnd SSF's, dagfest 28. mars 2023
- Kæra frá Havnar Svimjifelag til Ítróttadómstólin, dagfest 3. apríl 2023
- Frágreiðing frá Dómsnevnd SSF's til Ítróttardómstólin, dagfest 29. juni 2023
- Lógir og reglur Svimjisambands Føroya
- Lógir og reglur Ítróttasambands Føroya

**Málsgongd**

Undir EM í svimjing í Rom 11. – 17. august 2022 fær høvuðsvenjarin hjá Havnar Svimjifelag til vega eitt avritað atgonguloyvi hjá einum av føroysku svimjarunum, og letur hann síðani einum ónevndum útlendskum svimjara avritaða atgonguloyvið hjá føroyska svimjaranum.

Svimjisamband Føroya (SSF) varnast gerðina hjá høvuðsvenjaranum og tekur seinni avgerð um, at venjarin ikki verður úttikin til nakra uppgávu fyri SSF aftur. Sagt verður í avgerðini, at talan er um ein trygdarspurning, og at hetta er orsøkin til avgerðina.

Havnar Svimjifelag heitir síðani á Starsvnevnd SSF's um at taka málið upp til nýggja viðgerð, men hesum sýtir Starvsnevndin fyri í skrivi tann 16. september 2022.

Havnar Svimjifelag kærir avgerðina til Dómsnevnd SSF's og vísir í kæruni á, at:

1. Lutfalsmeginreglan (proportionalitetsfaktorurin) eigur at galda í tílíkum máli.
2. Revsingin rakar í størsta mun HS og svimjarar okkara.
3. Manglandi partshoyring.

Dómsnevnd SSF's heimvísir í avgerð tann 4. oktober 2022 málið til nýggja viðgerð í Starvsnevnd SSF's.

Avgerðin er grundað á, at Starvsnevndin hevur tikið eina avgerð, uttan at tað framgongur av málinum, at nevndin hevur hildið seg til galdandi reglur um partshoyring, ítøkiliga grundgeving og kæruvegleiðing. Dómsnevndin avgerð tí at heimvísa málið til nýggja viðgerð og avgerð í Starvsnevndini. Dómsnevndin heldur, at grundaður ivi er um, hvørt rættarligu manglarnir í málsviðgerðini hava ávirkað viðgerðina og avgerðina.

Í avgerð frá 27. januar 2023 linkar Starvsnevnd SSF's revsingina mótvegis Maciej Hampel niður í eitt ár frá 17. August 2022 at rokna. Venjarin verður sostatt ikki úttikin til uppgávur fyri SSF uttanlands í eitt ár.

Í avgerðini skrivar Starvsnevnd SSF's m.a. at:

*"Ein akkreditatión er eitt samleikaprógv, ið skal tryggja, at einans góðkendir persónar sleppa inn á ávís økir. Hetta fyri at verja íðkarar og aðrar lyklapersónar. Á hesi evropameistarastevnuni var harumframt eisini eyka krav um negativa koronatest fyri at verða góðkend/ur. Hartil er akkreditatiónin eitt atgongumerki til stevnuna, umframt at hon gevur atgongd til ókeypis gisting, flutning og mat.*
*Málið er viðgjørt sum játtanarmál í samband við avriting av akkreditatiónini, og í samband við koronastøðuna er málið viðgjørt samsvarandi frágreiðing frá ferðaleiðaranum."*

Starvsnevnd SSF's vísir víðari á, at:

*"Starvsnevndin hjá SSF metir, at talan er um groft álitisbrot, herundir serliga tí Hampel ikki hevur avritað sína egnu akkreditatión, men eina akkreditatión hjá einum svimjara, sum Hampel sum venjari vegna SSF hevði ábyrgd av. Tað í sær sjálvum ger brotið væl meira álvarsligt. Støðan kundi fingið álvarsligar fylgjur fyri svimjaran, umframt fyri alt liðið og fyri SSF, t.d. um støðan varð uppdagað av fyrireikarunum heldur enn fráboðað av SSF. Sum tað minsta kundi støðan skjótt gjørst tann, at akkreditatiónin hjá svimjaranum hevði verið inndrigin, og við tí øll atgongd til stevnu, flutning, mat og møguliga gisting. Harumframt setti venjarin koronastøðuna hjá øllum ferðalagnum í vanda, tí ferðalagið virkaði saman í eini 'koronaboblu'. Talan er tá bæði um heilsuvanda og um ítróttarligan vanda fyri svimjararnar, um hesir t.d. høvdu fingið karantenu vegna koronasmittu- ella vanda.*
*Víðari er enn óvist hvørjar avleiðingar SSF og svimjarar tess kunnu koma út fyri í framtíðini sum beinleiðis og/ella óbeinleiðis avleiðing av støðuni. Hendingin hevur væl møguliga skalað viðurskiftini í millum SSF og evropeiska svimjisambandið LEN, og í millum SSF og felagið sum átti viðkomandi svimjara, tá eitt álitisfólk hjá SSF (Hampel) á hendan hátt gjørdi seg inn á annars góða álitið partanna ímillum."*

Víðari skrivar Starvsnevndin í avgerðini:

*"Í síni avgerð metir starvsnevndin, at tað fyriliggja linnandi umstøður í samband við, at Hampel sjálvur hevur viðgingið brotið, eftir at tað varð uppdagað, men at tað hinvegin fyriliggja herdar umstøður, tí at Hampel lat avrita eina akkreditatión ikki hjá sær sjálvum ella t.d. í samráð við annan í ferðalagnum, men hjá einum svimjara, sum Hampel hevði ábyrgd av, og sum ikki var vitandi um hvat varð gjørt."*

At enda í grundgeving sínari skrivar Starvsnevndin:

*"Niðurstøða starvsnevnd SSF's er, at eitt tílíkt álitisbrot eigur at viðføra eina revsing. Starvsnevndin hevur í síni viðgerð mett um sjálvt brotið, aktuellu- og potentiellu avleiðingarnar, og harumframt hevur starvsnevndin eisini í síni viðgerð mett um revsingina sum fordømi í mun til møgulig komandi álitisbrot av tílíkum slag.*

*Niðurstøða og avgerð:*
*Maciej Hampel verður ikki úttikin til uppgávur fyri SSF uttanlands í eitt ár frá skaðadegnum hin 17. august 2022.*

*Avgerðin verður at fráboða til Maciej Hampel, Havnar Svimjifelag umframt limafeløgini undir Svimjisambandi Føroya."*

Havnar Svimjifelag kærir tann 7. mars 2023 avgerðina hjá Starvsnevnd SSF's til Dómsnevnd SSF's. Í avgerð tann 28. mars 2023 staðfestir Dómsnevnd SSF's avgerðina hjá Starvsnevnd SSF's.

Í avgerðini hjá Dómsnevnd SSF's frá 28. mars 2023 skrivar Dómsnevndin, at hon velur at:

*"fyrihalda seg til hetta prinsipiella mál.*

*Ongar nýggjar upplýsingar eru lagdar fram í skrivunum frá HS, sum kunnu sigast at hava týðandi og avgerandi týdning fyri tiknu avgerðina hjá Starvsnevndini um at útihýsa HS-venjaran frá altjóða landsliðsvirksemi umboðandi SSF í 1 ár roknað frá 17. august 2022. Partarnir hava í felag upplýst málið, og ein avgerð um revsirættarligu avleiðingina er tikin av Starvsnevndini. Onki fordømi er í føroyskari svimjing um líknandi brot. Tað er einki í málinum, sum bendir á, at revsingin er ov hørð ella saknar proportionalitet í mun til álvaran í framda brotinum.*

***Úrskurður hjá Dómsnevndini***

*Áheitanin frá Havnar Svimjifelag verður ikki gingin á møti. Mett verður, at avgerðin hjá Starvsnevndini nú er tikin á nøktandi upplýsingargrundarlagi, har HS og venjarin eru hoyrd og komin til orðanna sambært góðum fyrisitingarsiði.*

*Revsingin um at útihýsa HS-venjaran í 1 ár frá landsliðsvirksemi frá tí at brotið varð framt, tykist ikki vera órímilig við tilvísing til álvaran í brotinum. Onki fordømi er um líknandi brot.*

*Henda avgerð er endalig, sí § 10 í ÍSF-reglugerðini fyri dómsnevndir, har víst verður á, at henda avgerð bara kann broytast av ítróttardómstóli ÍSF's."*

**Málslýsing**

3. apríl 2023 kærir Havnar Svimjifelag avgerðina hjá Dómsnevnd SSF's til Ítróttadómstól ÍSF's.

Í kæruni ger HS galdandi, at revsingin er ikki proportional við framda brotið og átti at verið linari, so sum bót, ávaring ella ein styttri karantena. HS ger somuleiðis galdandi, at revsingin kann koma HS í álvarsligar trupulleikar, tí ungu svimjararnir hjá felagnum fara helst at missa venjara og leiðara sín, og úrslitið kann verða, at nógvir teirra gevast. At enda vísir HS á, at viðgerðin av hesum máli hevur verið út av lagi illa frágingin, og at hetta í sjálvum sær hevur verið ein revsing av bæði venjara og svimjarum.

Havnar Svimjifelag skrivar at enda í kæru sínari, at:

*"Samanumtikið er tað okkara greiða fatan, at revsingin als ikki stendur mát við misbrotið. Venjarin fær alt í verðini ov harðan dóm fyri eitt misbrot, sum var farið aftur við borðinum ella kanska hevði givið eina bót ella eina styttri karantenu, um talan var um annan persón, sum nevnt í dømunum omanfyri. Hetta er ikki rímiligt innan okkara siðvenju og rættarskipan í Føroyum. Venjarin er útlendingur, og okkara moralska skylda er tí kanska enn meira, at størri javnvág er millum misbrot og revsing og ikki minst galdandi presedens í SSF. Vit fara tí inniliga at heita á Dómsnevnd ÍSF um at seta revsingina niður, t.d. til eitt hálvt ár, sum vit halda hevði verið ein ivaleysa hørð revsing."*

Í viðgerð sínari av fyriliggjandi máli hevur Ítróttardómstólurin tikið støði í øllum tilfarinum í málinum.

Ítróttadómstólurin hevur harumframt biðið Dómsnevnd SSF's ummæla kæruna frá Havnar Svimjifelag, og herundir heitt á dómsnevndina um, at

1. fyrihalda seg til kærugrundirnar hjá kæraranum
2. greiða frá hvørji fyrilit, Dómsnevndin hevur brúkt í avgerðini, herundir
3. hvørja heimild, avgerðin um at útihýsa venjaranum í eitt ár, byggir á.

Dómsnevndin skrivar innleiðandi í svari sínum til Ítróttadómstólin tann 29. juni 2023, at *"Útihýsingin er fyri brot á regluverkið hjá SSF og LEN, har landsliðsvenjarin við brúk av offisiellum skjølum hjá einum svimjara fekk eitt vinfólk inn til kappingarøkið undir EM í Rom við somu atgongd, sum svimjarar hava. Venjarin hevur viðurkent brotið og at hava veitt vinfólkinum aðrar óheimilaðar fyrimunir undir EM."*

Síðani skrivar Dómsnevndin soljóðandi í ummæli sínum til Ítróttadómstólin:

*"Ad 1) Dómsnevndin hevur í kæruavgerðini frá 28. mars í reglubroti 2 og 3 yvirskipað nevnt kærugrundirnar, sum HS førir fram í kæruni, har berandi elementið er reglubrot 2 um longd á útihýsing frá landsliðsvirksemi, sum er sjálv "revsingin" og "avgerðin" hjá Starvsnevnd SSF's og sum rakar HS meint. Av tí at útihýsingin er tað berandi elementið í kæruni hjá HS, er tað eisini tann parturin av málinum, sum Dómsnevndin fyrihelt seg*

*til í síni viðgerð. Hóast tað ikki verður útpenslað í avgerðini hjá Dómsnevndini – sum staðfestir avgerðina hjá Starvsnevndini – so er tað misbrúkið av akkreditatiónini hjá einum svimjara til at veita einum vinfólki óheimilaðar fyrimunir undir EM í Rom – sum er sjálvt lógarbrotið og sum agarevsing verður ásett fyri. Tað framgongur greitt av málsviðgerðini hjá Starvsnevndini. Viðgerðin í Dómsnevndini er jú ein kæruviðgerð, har avgerðin hjá Starvsnevndini verður "eftirprøvað".*

***Ad 2)** Dómsnevndin hevur serliga mett, um fyrilitið til proportionalitet millum álvarssemi í brotinum og ásettu agarevsing er hildið í avgerðini hjá Starvsnevnd SSF's, sí reglubrot 1 og 2 undir "Úrskurður hjá Dómsnevndini". Dómsnevndin hevur ikki funnið orsøk at skúgva metingina og ásettu agarevsingina hjá Starvsnevnd SSF's til viks. Eisini varð víst á, at onki fordømi finst.*

***Ad 3)** Sambært lógini fyri Svimjisamband Føroya, grein 3, er Starvsnevndin hægsti myndugleiki í øllum svimjiviðurskiftum. Limaskyldurnar hjá feløgunum eru ásettar í grein 5 og sambært grein 5 bókstav a, skulu feløgini halda lógir og reglugerðir hjá SSF. Sambært § 10, stk. 2, bókstav f, skal tekniska nevndin í SSF handhevja regluverkið hjá SSF, LEN og World Aquatics í øllum kappingarviðurskiftum.*

*Dómsnevndin hevur ikki víst til svimjilógina ella etisku reglugerðina hjá SSF í síni dómsnevndaravgerð, men eyðsæð eru báðar bindandi og galdandi fyri allar limir SSF's. Eisini er etiska reglugerðin galdandi fyri venjarar og onnur tænastufólk (officials), sum útinna uppgávur fyri – ella umboða – SSF í Føroyum ella uttanlands. Henda reglugerð varð samtykt á vári 2022. Hetta merkir, at eisini landsliðsvenjarin undir EM í Rom í 2022, varð fevndur av etisku reglugerðini.*

*Dómsnevndin vísti heldur ikki til "CODE OF CONDUCT" hjá LEN (dagførd 9. des. 2006) reglu 2, bókstav c um "cheating but not limited to doping, falsification or alteration of birth certificates, documents of identification or any other document in dicating false age, false nationality or any other false information with the purpose of obtaining unfair advantage for an official, an athlete, or team" (okkara undirstriking). Sambært reglu 4 er heimild at agarevsa brot við hesum sektum: "Warning, fine, suspension, expulsion".*

*Dómsnevndin átti eisini at hava víst til reglu 15 og 16 og serliga reglu 16.2 í "CONSTITUTIONAL RULES (UPDATET MAY 2022 / AS APPROVED BY LEN CONGRESS MAY 14, 2022)", sum heimilar hesar agarevsingar fyri staðfest brot:*

*"Possible sanctions are:*

*16.2.1 a warning;*

*16.2.2 a fine;*

*16.2.3 a suspension for af fixed period;*

*16.2.4 a suspension until an imposed obligation will be fullfilled;*

*16.2.5 a suspension until a specified set of circumstances changes or ceases to exist;*

*16.2.6 witholding of grant or subsidies from a Member Federation;*

*16.2.7 exclusion. One or several of the sanctions may be combined."*

*Mett verður, at starvsnevndin við síni avgerð hevur hildið seg innanfyri heimildargrundarlagið hjá SSF og LEN, hóast tað sjálvandi átti at verið staðfest við ítøkiligum tilvísingum til heimildargrundarlagið í sjálvari avgerðini til Havnar Svimjifelag.*

*Tað er ein fyrisitingarligur feilur hjá Dómsnevndini, at nevndin ikki týðiliga vísti til heimildargrundarlagið fyri at staðfesta tyngjandi avgerðina hjá Starvsnevnd SSF's um at útihýsa venjaran hjá HS frá landsliðsvirksemi í 1 ár.*", stendur at enda í skrivinum frá Dómsnevndini tann 29. juni 2023.

**Ítróttadómstólurin skal viðmerkja**

Soleiðis sum málið er upplýst fyri Ítróttadómstólinum, herundir serliga í mun til innihaldið í skrivinum frá Dómsnevndini, dagfest 29. juni 2023, leggur dómstólurin til grund, at hvørki í avgerðini frá Starvsnevndini hjá SSF ella úrskurðinum frá Dómsnevndini verður víst til heimildargrundarlagið, ið avgerðirnar eru bygdar á, hvørki hvat viðvíkur spurninginum um, hvørjar reglur eru viðkomandi at brúka at meta um møguliga brotið, og heldur ikki í mun til spurningin um, hvør revsing er røtt og heimilað í mun til viðkomandi brot.

Av tí at málið í skipanini hevur verið viðgjørt sum eitt agamál, metir Ítróttadómstólurin, at tað er av stórum týdningi, at tann, ið avgerðin er vend ímóti, fær høvi at taka støðu til og gera viðmerkingar til alt avgerðargrundarlagið, t.v.s. bæði tað faktiska og tað løgfrøðiliga.

Meginreglurnar um legalitet og kontradiktión hava til endamáls at tryggja, at málsviðgerðin er í lagi.

Hóast Dómsnevndin metir, at at starvsnevndin við síni avgerð hevur hildið seg innanfyri heimildargrundarlagið hjá SSF og LEN, so er ógreitt, hvat ítøkiligt heimildargrundarlag varð nýtt, tá avgerðin varð tikin, og tí metir Ítróttadómstólurin, at málsviðgerðin inniheldur so munandi manglar, at úrskurðurin hjá Dómsnevndini, um at staðfesta avgerðina hjá Starvsnevndini, eigur at verða ógildaður.

**Úrskurður**

Ítróttadómstólurin ógildar úrskurðin hjá Dómsnevnd Svimjisambands Føroya frá 28. mars 2023.

Tórshavn 16. november 2023

Jóhan J. Lamhauge    Magnus Dam

Sissal Kristiansen    Heðin Joensen